17.04.2024

Til
Vinnunevnd Føroya Løgting
Hoyringsfundur LM 99/2023- Uppskot til løgtingslóg um burðardygga ferðavinnu. (Ferðavinnulógin.

Innleiðandi er Føroya Óðalsfelag av teirri fatan, at málið er av so stórum týdningi, at tað hevði tænt øllum pørtunum best, um allir partarnir tóku undir við uppskotinum, og at ein breið politisk semja fyrilág.

1) Ognar- og ræðisrætturin, og lunnindini, skulu virðast
2) Jarðarlógirnar skulu varðveitast fyri at verja náttúru og landbúnað
3) Hvørsmansrættur kann ikki góðtakast
4) Føroyingar skulu fáa loyvi at fara í hagan uttan at gjalda
5) Vinnuligt virksemi kann bert loyvast eftir avtalu við hagan
6) Ferðafólk skulu bert kunna ferðast eftir útvaldum bygdagøtum

Høvuðstrupuleikarnir við uppskotinum eru:
a) lógarásetti rætturin hjá øllum heimsins borgarum at ganga allastaðni,
b) at ræðisrætturin hjá óðalsfólki verður avmarkaður og lagdur til politiska myndugleikan
c) at landsstýrismaðurin, nýggjar tilvildarliga valdar nevndir og kommunur skulu yvirtaka rættindir hjá haganum, og
d) at forboð verður sett jarðareigarum at taka gjald fyri náttúruupplivingar og gjald frá teimum, ið skipa fyri handilssligari ferðavinnu.

Vit vilja tryggja føroyingum rættin til fjøllini og strondina, og metur politiski myndugleikin, at neyðugt er at staðfesta tað við lóg, so ber til at gera tað stutt og greitt.

Føroya Óðalsfelag